

Gassframleiðsla á Marcellus-økinum í Pennsylvania í USA. Mynd: Helge Hansen/Statoil

# Statoil selur ognir í USA

**Jógvan Hugo Gardar**

26.12.2014 - 11:52

Oljan.fo

Norska oljufelagið Statoil hevur um jólini boða frá at fyritøkan selur ein part av skiferolju-íløgunum í USA. Statoil hevur fyri 2,4 milliardir danskar krónur selt seks prosent av partabrøvunum í Marcellus-økinum í USA. Í samband við eina avtalu við Southwestern Energy minkar Statoil sín ognarpart úr 29 til 23 prosent, skrivar Statoil.com.

Torstein Hole, ið er stjóri fyri oljuframleiðsluni á landi hjá Statoil í USA, sigur at hetta er ein roynd at fáa sum best burturúr íløguni, og samstarvinum við Southwestern Energy.

Statoil framleiddi í triðja ársfjóðringi í ár 130.500 oljulíkar um dagin á Marcellus-økinum. Av hesum blivu umleið 4000 fót framleidd á økinum har Statoil nú hevur selt ein part av ogtnini.